# Sumbingar skulu betala meiri í skatti

**Skattaprosentið í Sumba er hækkað tvey prosent men afturfyri fáa sumbingar ein fyrstafloks skúla**

ÚTBYGGING
*Áki Bertholdsen*



*Hesi bæði næstu árini skal skúlin í Sumba bæði umvælast og byggjast út fyri fleiri milliónir*

**Sumba:** Sumbingar noyðast nú at leggja ryggt til at betala nokk so fitt meiri í skatti, enn teir hava gjørt. Bygdaráðið hevur nevniliga samtykt at hækka kommunuskattin 2%. Sumbingar hava betalt 18% í kommunuskatti, men nú er skatturin hækkaður upp í 20%.

Tað fer at geva kommununi eina eyka inntøku uppá eina slaka millión.

Jacob Vestergaard, borgarstjóri, sigur, at høvuðsorsøkin til at skatturin hækkar, er fyri at fáa ráð til at byggja skúlan út.

Ætlanin er at byggja skúlan út fyri fleiri milliónir hesi bæði næstu árini og fyri at fáa ráð til tað, verður neyðugt at hækka skattaprosentið.

Men afturfyri fáa sumbingar so ein fyrstafloks skúla, sum verður næstan tvær ferðir so stórur, sum skúlin er nú.

Borgarstjórin sigur, at í fyrra lagi er ætlanin at høvuðsumvæla skúlabygningin. Í øðrum lagi verður skúlin útbygdur so at hann verður næstan tvær ferðir so stórur, sum hann er nú.

– Sostatt verður at kalla talan um ein spildurnýggjan skúla, leggur hann afturat Mentamálaráðið hevur góðkent ætlanina og skúlin verður liðugur til skúlaárið 2004.

Arbeiðið verður gjørt bæði tí at skúlin,sum er, trongir til ábøtur og tí at nýggja fólkaskúlalógin setir heilt onnur krøv til skúlabygningar, enn áður við, serstovum og øðrum.

Fyri ikki at órógva útbjóðingina, vil hann ikki siga, hvussu nógv arbeiðið kostar, men talan er um fleiri milliónir.

Jørð og betrongarbeiðið er bjóðað út og har hevði Jóanes við Ósagarð í Vági lægsta tilboðið. Hann hevur boðið sær til at gera arbeiðið fyri stívliga 1,3 millión. Trý onnur tilboð komu inn og tað hægsta var uppá 1,7 millión.

Hini arbeiðini upp á skúlan verða boðin út fyrsta dagin.

Umframt skúlan, hevur kommunan ikki orku til tað stóra, men arbeitt verðrur eisini við at innrætta nýggju kommunuskrivstovuna, sum verður í gamla Fiskahúsinum, sum kommunan keypti og hon verður liðug í apríl.

Annars verður hildið fram við at gera bakkaverjuna.

### Øll fíggjarmegin

Borgarstjórin sigur, at ætlanin er ikki at taka lán til arbeiðið, so hesi næstu árini fer skúlin við allari fíggjarmegi ni hjá kommununi, men ætlanin er ikki at taka lán til endamálið og tí var neyðugt at hækka skattin.

Samstundis eru útlitini ikki av teimum bjartastu, eitt nú er laksavirkið hjá Hera Hjelm steðgað í fleiri mánaðir.

– Inntøkugrundarlagið í kommununi er ov lágt, tí miðalinntøkan hjá Sumbiar Kommunu er nógv lægri enn hjá sama slag kommununum á meginlandinum.

– Hann plagar at samanbera Sumbiar Kommunu við Sunda Kommunu. Sumbiar kommuna hevur níggju milliónir í skattainntøku við 20% í skatti, men Sunda Kommuna hevur 12 milliónir í inntøku við 16,5% í skatti.

Orsøkin er, at í Sunda Kommunu hava tey nógv betri atgongd til væl lønt størv, eitt nú í Havnini og aðrastaðni í miðstaðarøkinum.

Annars sigur Jacob Vestergaard, at barnatalið í kommununi hevur verið fallandi, men at nú er ein glotti í.

Í Sumba eru um 30 skúlabørn men heldur ikki á hesum økinum eru útlitini ikki nakað serlig. Fá børn eru fødd, og tó at tað gongur framá, er føðitíttleikin alt ov lítil

Ein annar skúli er í kommununi, tað er skúlin á Leiti ímillum Lopra og Akrar. Og eisini har stendur so illa til við børnum, at um fá ár verða 15 børn í skúlanum í Sumba og onki á Leiti, sum er hin skúlin í kommununi.

Tá ið skúlin í Sumba varð bygdur síðst í fimtiárunum og fyrst í sekstiárunum, vóru 70 skúlabørn í Sumba.

# Fleiri hundrað útróðrarmenn sita nú og trilla tumlarnar

**Hendrik Old sigur, at hann nú fer at heita á Løgmann um at syrgja fyri, at gamlir menn og aðrir, sum hava útróður til hjávinnu, aftur sleppa til útróðrar**

ÚTRÓÐUR
*Áki Bertholdsen*



*Í løtuni liggja hundraðtals útróðrarmenn uppi á turrum, tí teir sleppa ikki út og tða líkist ongum, heldur Hendrik Old og tí fer hann enn einaferð at reisa málið í Løgtinginum*

– Tá ið Jørgen Niclasen ikki klárar at gera nakað við tað, má løgmaður taka um endan.

Hendrik Old, løgtingsmaður, fer nú at heita á løgmann um at fáa skil á viðurskiftunum hjá teimum, sum hava útróður til hjávinnu.

Fiskidagarnir hjá Bólki B vóru uppi tíðliga í desember og hóast Jørgen Niclasen tvær ferðir fyri jól lovaði at loysa trupulleikan, er onki hent enn.

– Tí fari eg nú at heita á Løgmann um at fáa viðurskiftini í rættlag, sigur Hendrik Old.

Hann sigur, at á fyrsta spurnartíma í Løgtinginum, sum verður mikudagin,fer hann at spyrja Løgmann um hann ikki kann taka um endan, so at teir hundraðtal útróðarmenninir, sum nú hava ligið uppi á turrum og hugt út á hav í fínastu líkindum, nú sleppa at loysa aftur.

Hendrik Old sigur, at teir mestu av teimum, sum eru raktir, hava smáar bátar, sum fiska inni við land og tað kann ikki vera meiningin at leggja teir lamnar, samstundis sum tey stóru skipini fiska at kalla frítt.

– Tað eru yvir 200 bátar í bólki B og teir hava ligið á turrum í ein mánað nú og tað kann ikki ganga, tí teir oyða ongan stovn.

– Hetta er fyri ein part gamlir menn, sum hava útróður sum eitt ískoyti til pensjónina og fyri at fáa tíðina at ganga. Annars eru tað nógvir menn á smábygd, sum eru í hesum bólki.

– Og hvat skulu gamlir menn, sum hava verið útróðrarmenn alt lívið, og hvat skulu bygdarmenn gera, tá ið teir ikki sleppa at rógva út.

Hetta eru menn, sum liggja í einum fjarðarmunna og fáa nakrar fiskar, ella sum binda í ein aliring og fáa eitt sindur, sum teir avreiða.

Og tað er nógv fyri, at teir skulu liggja lamnir í verðsins fínasta veðri.

Hendrik Old sigur, at hann tí fer at heta á Løgmann um at bera so í bandi at fáa eina politiska semju um, hvussu hesir kunnu sleppa til útróðrar aftur sum skjótast.

– Ein loysn kann vera at taka teir partvíst burturúr skipanini, so at teir ikki verða avroknaðir fyri ein fiskidag, fyrrenn teir hava avreitt 800 ella 1000 pund, sigur Henrik Old.





*Tað, sum eftir stendur fyri endanum á Gásadalstunlinum, skal fáast burtur. Loftið skal tryggjast, og vegbreytin gerast farbar*
*Mynd: Jens Krisitan Vang*

# Halda fram til Gásadals

**Hol skal nú fáast ígjøgnum til Gásadals, men opið verður ikki enn fyri almennari ferðslu, sigur landsverkfrøðingurin**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Tað, sum eftir stendur fyri endan á Gásadalstunlinum, skal fáast burtur. Loftið í tunlinum skal tryggjast, og fyribils koyribvegur gerast oman í bygdina.

Tað er setningurin í ár hjá landsverkfrøðinginum í samband við Gásadalstunnilin, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur.

Men tað verður ikki latið upp fyri almennari ferðslu enn á sinni, skilst á honum.

Tríggjar milliónir krónur eru settar av til Gásadalstunnilin í hesum árinum. Fyri tær skal loftið í tunlinum tryggjast. Vegbreytin skal gerast farbar, møtipláss gerast uttan fyri tunnilsmunnan Gásadalsmegin, og ein fyribilsvegur - traktorvegur - skal gerast millum tunnilsmunnan og bygdina í Gásadali, sigur landsverkfrøðingurin.

Arbeiðsfólkið hjá landsverkfrøðinginum er farið undir at taka tað seinasta tilfarið niður frá tunnilsmunnanum, og síðan verður loftið tryggjað.

Tað merkir tó ikki, sigur landsverkfrøðingurin, at tað verður farandi gjøgnum tunnilin hjá hvørjum sum helst.

Nú opið verður, verður væntandi onkur avtla gjørd millum starvsfólkið í tunlinum og eitt nú postmannin í Gásadali um, at hann kann sleppa gjøgnum tunnilin við postinum. Men tað verður so altíð saman við fólki frá landsverkfrøðinginum og við teirra bilum, sigur Oyvindur Brimnes.

Tá loftið so er tryggjað, kanska einaferð í summar, verður loyvt onkrum afturat at sleppa ígjøgnum. Tó ikki so, at hvør sum helst sleppur at koyra. Bummur veðru settur fyri og bert fólk, sum hava tilknýti og ella ørindi til Gásadals, fáa lykil sleppa at koyra ígjøgnum, sigur hann.

# Eftirspurd gina

**Í sendingini »Syngið við«, sum Sjónvarpið sendi úr Sumba á Nýggjárinum, var serliga ein sangur, sum fleiri hyggjarar vildu ogna sær. Eftir áheitan verður hann nú prentaður**

GINUKVØÐA

Sumbingar sungu um ginuna í Sjónvarpinum á nýggjárinum. Rúni Lisberg í Sumba hevði yrkt.

So mikið væl var hesin sangur umhildin av hyggjarunum, at nógv hava vent sær til teirra, sum skipaðu fyri, við fyrispurningi um at fáa hendan sangin.

Eftir áheitan verður kvøðan til ginuna nú prentað, og sumbingarnir siga, at nú er bara at brúka hana!

**ej**

Lag: Tað var ein fagran summardag

*Ein stillan vakran summardag*
*var Ginusøgan fest á blað,*
*hon kend varð skjótt um víðu verð,*
*og nú vit hava hana her.*

*Men gakk. Tann móttøka hon fekk,*
*og onkur ynskti hana vekk,*
*reklamu fekk tó hetta skarð*
*á tingsins pall framborin varð.*

*Ja drúgt var orðaskiftið her*
*um fitta stikkið kvinnan ber,*
*av tveimum monnum bleiv tað svíkt,*
*ei mentan kallaðu teir slíkt.*

*Og sárað lítla Ginan græt,*
*men ginur geva ei so uppat,*
*í tinginum hon ikki fall,*
*um Føroyar fór frá pall til pall.*

*Alt Føroya land tú tók við storm*
*og áskoðarafjøld enorm*
*nú vildi síggja hendan leik*
*og ikki ein av teim tú sveik.*

*Nú mentan ginan vorðin er,*
*hvat tingmenn siga, sama ger,*
*til leik hon altíð nú er klár*
*ja bæði við og uttan hár.*

*Til tín nú takk vit bera her,*
*tú setti okkum øll í verð,*
*hvørt mansbarn hetta sanna má*
*at gjøgnum teg fyrst ljós tað sá.*

**Rúni Lisberg**

# Vædderen bjargaði írskari kvinnu

**Meðan sjóverjuskipið Vædderen á nýggjárinum vitjaði í Írlandi, bjargaði manning av skipinum eini kvinnu, sum datt á sjógv stutt haðani, skipið lá**

BJARGING



Tað tók manning av Vædderen umleið fimm minuttir at seta bát út og fáa kvinnuna undir læknahond umborð á Vædderen, sigur Færøernes Kommando í tíðindaskrivi.

Vædderen var á vitjan í Cork í Írlandi í døgunum 31. december til 3. januar. Skipið er júst afturkomið til Føroya, sigur Førernes Kommando.

Fyrrapartin nýggjársdag sá fólk av Vædderen, at ein kvinna datt í kanalina yvir av har, Vædderen lá við bryggju. Bátur var beinanveg settur út, og teir fingu kvinnuna inn í bátin einar tvey hundrað metrar frá skipinum. Streymur var í kanalini.

Kvinnan varð fingin umborð á Vædderen og kom undir læknahond. Hon tóktist lívleys, tá hon kom umborð, men kom skjótt fyri seg aftur. Síðan varð hon við sjúkrabili flutt á sjúkrahús í Cork, og kom skjótt reiðiliga fyri seg aftur og livir nú væl, sigur Færøernes Kommando í tíðindaskrivinum.

**ej**